## Ársins barnabókagáva

60 ára dagurin hjá ST-mannarættindasáttmálanum verður hátíðarhildin við einari barnabók, sum Bókadeild Føroya Lærarafelags og Amnesty Internationalí samstarva um. Í barnabókini "Vit eru øll fødd fræls", verða allar 30 greinirnar í heimsyvirlýsingini lýstar í myndum, sum altjóða viðurkend listarfólk hava gjørt. Marna Jacobsen hevur týtt bókina úr enskum. Mentamálaráðið hevur avrátt at lata øllum fólkaskúlum eintøk av bókini í mun til næmingatalið. Á hendan hátt er vónin, at næmingar verða kunnaðir um mannarættindi. Bókin, sum er 68 síður í litum, verður at fáa í Norðurlandahúsinum í dag og um alt landið.



## Danir fylla seg við tablettum

Í meðal eta danir 175 høvuðpínutablettir um árið ella eina tablett annan hvønn dag, og tað er sambært serfrøðingum júst nóg mikið, til at fólk ikki fáa tað linnandi gagn av tablettunum, sum ætlanin er. Tvørturímóti elva tablettirnar til ymisk hjáárin, sum tær upprunaliga vóru ætlaðar til at forða fyri. Tað sigur leiðarin á Dansk Hovedpinecenter, Rigmor Højland Jensen, við Nyhedsbrevet Newspaq. Hon sigur, at taka fólk høvuðspínutablettir annan hvønn dag ella oftari, kunnu tablettirnar fáa øvugta ávirkan.

# Føroyar heimsmet í oljunýtslu

**Hvør einasti føroyingur brúkar 13 litrar av olju um dagin og tað er meiri enn tey brúka bæði í Amerika og niðri í Evropa**

OLJUNÝTSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Føroyingar brúka so nógva olju, sum ongin annar.

Tað staðfesti Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur, á almennum kjakfundi, sum Tjóðveldið skipaði fyri í Miðlahúsinum í gjárkvøldið.

Hann vísir á, at tað er rættiliga sigur, ymiskt, hvussu nógva olja, tey ymsu londini brúka.

Ì Kina brúka hvørt fólk bara ein hálvan litur av olju um dagin.

Í Evropa brúkar hvørt fólkið fimm litrar av olju um dagin og í USA er nýtslan 11 litrar fyri hvørt fólkið um dagin.

- Men hvør føroyingur brúkar 13 litrar av olju um dagin.

Ein spurningur, sum mangan er reistur úti í heimi, er, um tað er rættvíst, at tey ríku londini brúka tað mestu oljuna og harvið trýsta oljuprísin upp, samstundis sum tey eisini eru tey londini, sum eru best før fyri at granska og leggja um til aðrar orkukeldur.

Harafturat er tað júst hetta, sum forðar teimum fátæku londunum at menna seg.

| Land | Oljunýtsla fyri hvørt fólk um dagin |
|---|---|
| Kina | 0,5 litrar |
| Evropa | 5,0 litrar |
| USA | 11,0 litrar |
| Føroyar | 13,0 litrar |




# Brúka milliónir himmalrúmið

**Føroyingar hava ongi krøv til, hvussu vit skulu byggja hús og tað førir til, at ein stórur partur av okkara oljunýtslu upp í royk og bláan himmal, sigur Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur**

OLJUNÝTSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



- Tað er heilt neyðugt, at vit seta eina reglugerð í gildi í Føroyum, har krøv verða sett til, hvussu vit skulu byggja okkara hús.

Tað staðfesti Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur á almennum fundi, sum Tjóðveldi skipaði fyri í Miðlahúsinum í Gjárkvøldið.

Hann vísir á, at í flestu londum stavar eini 40% av orkunýtsluni frá olju og tað verður í mesta mun brúkt til bilar, treylarar og annan flutning.

- Ì Føroyum kemur 94% av orkuni frá olju, tí vatn, vindur og orka frá brennistøðum er bara ein viðfángingur.

- Sostatt hava vit í Føroyum ein sera stóran trupulleika at loysa og tað er rættiliga grundleggjandi fyri okkum, at vit sleppa okkum burtur frá oljuni, sigur Magni Laksáfoss.

Hann staðfestir, at innflutningur av olju og prísurin á oljuni, hangar rættiliga tætt saman og tí verður tað dýrari og dýrari fyri okkum, so hvørt sum oljan dýrkar.

- Tí eiga vit at fara burtur frá oljuni, áðrenn hon fer burtur frá okkum, legði hann afturat.

### Bilar ikki trupulleikin

Hann sigur, at tí eiga vit at gera íløgur í varandi orku fyri at sleppa av við oljuna.

- Samstundis eiga vit at seta okkum greið mál og reglur fyri, hvussu vit byggja hús fyri at minka um oljunýtsluna til varma.

Hann sigur, at hetta hevði gjørt veruligan mun.

- Skipaflotin brúkar helvtina av oljuni, vit brúka, men 30% av oljunýtsluni fara til at hita hús upp við. Samstundis brúkar SEV 15% av oljuni.

- Sostatt fara 45% av okkara oljunýtslu til at varma hús upp við og til SEV.

Hinvegin brúka bilar og flogfør bara 10% av okkara innflutningi av brennievni.

Magni Laksáfoss staðfesti sostatt, at skulu vit minka um oljunýtsluna og vakstrarhúsárinið, nyttar lítið at tosa um, hvussu nógv bensin verður brúkt í bilum, tí tað er als ikki har, at trupulleikin er.

- Umframt at vit eru í eini fíggjarkreppu, eiga vit at gera íløgur til at minka orkunýtsluna og til at leggja um til varandi orku, staðfesti Magni Laksáfoss.

Og hann heldur, at tað fyrsta, vit eiga at gera, er at fáa orkunýtsluna niður.

- Í Føroyum hava vit nógvan vind og her átti tað ikki at verðið neyðugt at brúkt so nógva olju.

- Kanska verður varandi orka eitt sindur dýrari, men við teimum forsagnum, sum eru, fer oljan eisini at dýrka munandi

### Krøv til sethús

Magni Laksáfoss helt, at tað ber til at minka oljunýtsluna hjá sethúsum munandi.

- Vit hava onga byggireglugerð og sostatt ongi almenn krøv til, hvussu okkara hús skulu bjálvast.

Og hann staðfesti, at veruleikin er, at vit bjálva húsini nógv verri enn tað, sum er krav í okkara grannalondum.

Í øðrum londum verða krøv sett til, hvussu hús skulu bjálvast og eitt vanligt krav er, at hús hava minst 40 sentimetrar av bjálving.

Í Føroyum verður sjáldan farið upp um 25 sentimetrar og oftani minni.

- Mátin, vit byggja hús upp á, er øgiliga orkukrevjandi og vit hava ongi krøv til bygging, sjálvt um vit búgva í einum landi við nógvum vindi, sum kølir húsini illa.